Sosialurin
...títt vinnublað





VINNAN
VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Eimskip fallið 96 prosent í virði

**Kursurin á Eimskip partabrævinum er lækkaður heili 96,5 prosent seinasta ári, og okkurt bendir á, at felagið hevur stóran tørv á reiðum peningi. Felagið hevur júst selt sín ognarlut av einum norskum reiðarii og arbeiðir við at selja sín part av einum øðrum felagi eisini. Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, sum er dóttirfelag hjá Eimskip, sigur, at ongar broytingar eru í virkseminum hjá Faroe Ship.**



*Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, er sannførd um, at móðirfelagið Eimskip ætlar at halda fast um síni kjarnuøkir, sum millum annað er virksemið í Føroyum hjá Faroe Ship. Eimskip selir annars í hesum døgum burtur av sínum ognum í útlandinum*

FÍGGJARKREPPA
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Eitt fall í partabrævkursinum á 62 prosent eftir bara einum degi var tað, sum íslendski shipping risin Eimskip upplivdi mikudagin í farnu viku. Eimskip er móðurfelagið hjá føroyska Faroe Ship, sum er gamla Skipafelagið. Og at síggja til sær ikki lovandi út við gjaldførinum hjá móðurfelagnum.

Fríggjadagin í farnu viku kunngjørdi Eimskip, at tað hevur sloppið sær av við sín part í norska shippingfelagnum Euro Container Line til Wilson ASA, og svaraði hetta til 50 prosent av felagnum. Søluprísurin er sambært fráboðanini 18 mió. danskar krónur í dagsins kursi, og vinningurin av søluni er 12,3 mió. danskar krónur. Tað skilst, at Eimskip eisini roynir at sleppa sær av við eitt annað felag í útlandinum, Versa Cold Altas, sum Eimskip eigur 40 prosent í. Og her er talan um eina munandi størri upphædd enn við Euro Container Line.

Keldur vilja vera við, at felagið hevur lænt nógvan pening at víðka um virksemið í útlandinum fyri, og nú felagið selir burturav, er tað millum annað tí at tørvur er á reiðum peningi at gjalda skuld fyri.

## Vaksið ómetaliga skjótt

Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, sum er dóttirfelag hjá Eimskip, sigur seg ikki kunna gera stórvegis viðmerkingar um móðirfelagið, men ásannar tó, at tað at selt verður burturav nokk er ein staðfesting av, at felagið roynir at minka um sínar ognir í útlandinum.

- Eimskip er vaksið ómetaliga nógv seinastu 4-5 árini. Har upprunaliga eini 80 prosent av virkseminum var innanlands og restin uttanlands, er hetta vent á høvdið í dag, so at tað nú hevur eini 80 prosent av virkseminum uttanlands. Felagið hevur ekspanderað nógv, eisini uttanfyri shipping-økið, men roynir nú eftir øllum at døma at selja burtur av aftur fyri at minka um virksemið uttanfyri og halda fast um síni kjarnuøkir, sigur Jóhanna á Bergi.

Hon vissar um, at virksemið hjá Faroe Ship gongur sína heilt vanligu gongd, og hon væntar ikki nakrar broytingar yvirhøvur, sum støðan er.

- Eimskip sigur heilt greitt, at tað heldur fast um síni kjarnuøkir, sum millum annað umfatar virksmið hjá okkum, staðfestir hon.

Kursurin á partabrøvunum hjá Eimskip á keypskálanum í Reykjavík er annars fallin heili 96,5 prosent seinasta árið – úr kurs 42,8, sum var tann 22. oktober í fjør, til kurs 1,5 mikudagin í farnu viku. Mikudagin í farnu viku var dagurin, tá íslendski keypskálin fyribils varð latin aftur orsakað av óvanligum umstøðum í Íslandi. Keypskálin letur annars upp aftur í dag.

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK





HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich